# Kunngerðablaðið A

2009 Hefti 17

ISSN 0907-905X


Nr. 90 15. juni 2009

**Kunngerð**
**um**
**ískoytisútbúgving fyri sjúkrarøktarfrøðingar, útbúnir eftir eldri lógum**

Við heimild í § 18, stk. 5 í løgtingslóg nr. 2 frá 22. januar 2003 um útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum verður ásett:

*Endamál, longd, o.a.*

**§ 1.** Endamálið við ískoytisútbúgvingini til bachelor í sjúkrarøktarfrøði er at geva sjúkrarøktarfrøðingum, ið eru útbúnir eftir eldri lógum, møguleika til at uppstiga eldru útbúgvingina til bachelor í sjúkrarøktarfrøði. Ískoytisútbúgvingin skal geva teimum lesandi ástøðiligan og verkligan førleika og kunnleika til vísindalig háttaløg og evnir til eftir lokna útbúgving at:

1) menna sjúkrarøkt og útinna dygdar- og menningararbeiði og haraftrat fylgja, gera nýtslu av og taka lut í granskingararbeiði á heilsuøkinum og
2) halda fram í ástøðiligum og kliniskum førleikagevandi framhaldslestri, umframt akademiskari framhaldsútbúgving.

**§ 2.** Ískoytisútbúgvingin er ásett at vera ½ studentsársverk ella 30 ECTS stig, men fevnir um eitt ár.
*Stk. 2.* Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya avger, hvussu nógv lesandi kunnu fara undir lestur hvørt skeið. Landsstýrismaðurin kann tó áseta eitt hægsta tal av lesandi við upptøku.

**§ 3.** Ískoytisútbúgvingin gevur rætt til heitið bachelor í sjúkrarøktarfrøði, enska navnið er Bachelor of Science in Nursing (B.Sc.).
*Stk. 2.* Ískoytisútbúgvingin skal vera lokin í seinasta lagi 2 ár eftir, at hon er byrjað. Rektarin kann í serligum førum gera undantøk frá hesi reglu.

*Skipan og innihald*

**§ 4.** Ískoytisútbúgvingin er býtt í tríggjar eindir, sum ávíkavist eru 6, 9 og 15 ECTS stig.
*Stk. 2.* Fyrsta eind er 6 ECTS stig. Luttakararnir ogna sær grundleggjandi kunnleika og háttalagsligan førleika innan vitan, vísindi og gransking á vísindaligum stigi og ogna sær førleika innan eina vísindaliga tilgongd til sjúkrarøktaryrkið. Eisini ogna lesandi sær kunnleika til kunningartøkni.
*Stk. 3.* Onnur eind er 9 ECTS stig, og er valfrí eind. Í valfría partinum kunnu lesandi velja ymisk klinisk sjúkrarøktarfaklig øki, sum skulu verða viðgjørd við støði í fyrstu eind.
*Stk. 4.* Triðja eind er 15 ECTS stig. Ískoytisútbúgvingin endar við bachelorritgerð. Í arbeiðinum við bachelorverkætlanini, sum er 15 ECTS stig, skal tann lesandi vinna sær førleika innan sjúkrarøktarfakligt menningararbeiði. Í verkætlanini verður viðgjørdur ein sjálvvaldur spurningur við evni úr kliniskari sjúkrarøkt og við vísindaligum háttalagi. Verkevnið skal verða góðkent av Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya.

*Próvtøka*

**§ 5.** Rektarin ger av, um royndirnar á ískoytisútbúgvingini eru innanhýsis ella uttanhýsis, og um metingarnar Staðið/Ikki staðið ella próvtalsstigi verður nýttur til royndirnar.
*Stk. 2.* Bachelorverkætlanin verður dømd við einari uttanhýsis roynd.
*Stk. 3.* Tann lesandi skal hava staðið tær innanhýsis og uttanhýsis royndir, sum eru ásettar í námsskipanini fyri fyrstu og aðru eind, áðrenn bachelorverkætlanin er endaliga avgreidd.
*Stk. 4.* Viðvíkjandi próvtøku, royndarhættum, próvdøming, próvskjølum, kærum um próvtøku osfr. verður víst til kunngerð um próvtøku við útbúgving av sjúkrarøktarfrøðingum.

*Námsskipan*

**§ 6.** Rektarin skal gera eina námsskipan, sum neyvt lýsir innihald o.a. í útbúgvingini. Landsstýrismaðurin góðkennir námsskipanina.
*Stk. 2.* Í námsskipanini verða ásettar reglur um:

1) endamál og innihald í teimum einstøku lærugreinunum í lestrinum, hvussu nógvar tímar tær fevna

um, nær undirvíst verður, og hvussu dømt verður. Lærugreinirnar verða ásettar í ECTS stigum,
2) undirvísingar- og arbeiðshættir í útbúgvingini, íroknað kunningartøkni í undirvísingini, sambært § 4,
3) valfría partin, sambært § 4, stk. 3,
4) bachelorverkætlanin, sbrt. § 4, stk. 4,
5) góðskriving, sambært § 7, stk. 1.

*Stk. 3.* Umframt reglur, sum eru ásettar sambært hesi kunngerð, umfatar námsskipanin reglur, sum eru ásettar sambært kunngerð um próvtøku við útbúgvingina til sjúkrarøktarfrøðing.

*Aðrar reglur*

**§ 7.** Rektarin kann í hvørjum einstøkum føri gera av, at útbúgvingarpartar, sum ein lesandi hevur staðið við eina aðra útbúgving, heilt ella lutvíst kunna góðskrivast í ískoytisútbúgvingini. Avgerðin verður tikin við støði í fakligari meting.

*Stk 2.* Avgerðir rektarans sambært stk. 1 kunnnu verða kærdar til landsstýrismannin.

*Stk. 3.* Kæra kann verða latin inn í seinasta lagi 2 vikur eftir, at tann, sum kærir, hevur fingið fráboðan um avgerðina.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann síggja burtur frá kærufreistini, tá serlig viðurskifti tala fyri tí.

**§ 8.** Landsstýrismaðurin kann góðkenna frávik frá hesi kunngerð sum liður í royndar- og menningarvirksemi. Ásett verður, hvussu leingi royndar- og menningarvirksemi skal vara, og hvussu frágreiðing í hesum sambandi skal verða tilevnað.

*Gildiskoma*

**§ 9.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fevnir eisini um lesandi, sum byrjaðu ískoytisútbúgvingina eftir 1. september 2008.

Mentamálaráðið, 15. juni 2009

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

Nr. 91 22. juni 2009

**Kunngerð**
**um**
**flyting av kærumyndugleika til kærunevndina í lendismálum**

Við heimild í § 11 í løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir, sum broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 25. mai 2009, verður ásett:

**§ 1.** Heimild landsstýrismansins sum kærumyndugleiki sambært eigaraíbúðarlógini verður lagdur til kærunevndina í lendismálum, sbr. Løgtingslóg um kærunevnd í lendismálum.

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. juli 2009.
*Stk. 2.* Kærur, sum verða móttiknar frá og við 1. juli 2009, verða viðgjørdar og avgreiddar av kærunevndini í lendismálum.
*Stk. 3.* Kærur, sum Innlendismálaráðið hevur móttikið til og við 30. juni 2009, verða viðgjørdar og avgreiddar av Innlendismálaráðnum.
*Stk. 4.* Sum móttøkudagur verður roknaður tann dagur, tá kæran er stemplað sum móttikin.

Innlendismálaráðið, 22. juni 2009

**Annika Olsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Rúni Joensen (sign.)

Nr. 92 23. juni 2009

# Kunngerð um stuðul til heilivág v.m. eftir almannapensjónslógini

Við heimild í § 12b, stk. 3 í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum broytt við løgtingslóg nr. 108 frá 12. desember 2008, verður ásett:

*Persónsskari*

**§ 1**. Pensjónistar hava rætt til stuðul til útreiðslur í sambandi við keyp av heilivági sambært § 12b í almannapensjónslógini.

*Treytir*

**§ 2.** Stuðulin fevnir um

1) útreiðslur til heilivág á forskrift, sum er heimilaður tilskot frá sjúkrakassanum, og
2) útgerð, ið er neyðug fyri, at hesin heilivágurin kann nýtast, ella er fyritreyt fyri, at nýtslan er so munagóð, sum hon eigur at vera, og hevur beinleiðis samband við læknafyriskipaða viðgerð.

*Egingjald*

**§ 3.** Pensjónistur, sum í mesta lagi hevur eina inntøku, pensjón íroknað, ið svarar til fólkapensjón og útgjald úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, rindar sjálvur tær fyrstu kr. 400,- um ársfjórðingin. Við inntøku er at skilja inntøka sambært § 20 í løgtingslóg um almannapensjónir umframt pensjón og útgjald úr arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum.

*Stk. 2.* Aðrir pensjónistar gjalda sjálvir tær fyrstu kr. 600,- um ársfjórðingin.

*Stk. 3.* Er pensjónisturin giftur, eru inntøkuupphæddirnar, nevndar í stk. 1 og 2, pensjónsupphæddirnar fyri hjún.

*Kærumyndugleiki*

**§ 4.** Avgerðir tiknar sambært hesi kunngerð kunnu kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at umsøkjarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

*Gildiskoma*

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. juli 2009.

Almannamálaráðið, 23. juni 2009

**Rósa Samuelsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/Eyðun Mohr Hansen (sign.)

Nr. 93 23. juni 2009

# Kunngerð um stuðul til heilivág v.m. eftir forsorgarlógini

Við heimild í § 18, stk. 8, í lov for Færøerne om offentlig forsorg, jfr. lovbekendtgørelse nr. 100 af 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 25. mai 2009, verður ásett:

*Persónsskari*

**§ 1**. Persónum, ið eru avlamnir, varandi sjúkir ella ellisbrekaðir, kann Almannastovan, eftir umsókn, veita stuðul til ávísan heilivág og ávís hjálparráð smb. § 18, stk. 7, í forsorgarlógini.

*Treytir*

**§ 2.** Stuðul verður bert veittur til heilivág á forskrift, sum er heimilaður tilskot frá sjúkrakassanum.

*Stk. 2.* Stuðul til hjálparráð verður bert veittur til útgerð, ið er neyðug fyri at tann tilskotsheimilaði heilivágurin, smb. stk. 1, kann nýtast, ella er fyritreyt fyri at nýtslan er so munagóð, sum hon eigur at vera, og hevur beinleiðis samband við læknafyriskipaða viðgerð.

**§ 3.** Stuðul eftir § 1 verður ikki veittur til heilivág, ið er keyptur, áðrenn umsókn er latin Almannastovuni. Í teimum førum, læknin hevur søkt um sertilskot frá sjúkrakassanum, kann stuðul tó veitast frá tí degi, møgulig játtan av sertilskoti fær gildi.

*Egingjald*

**§ 4.** Stuðul eftir § 1 kann einans veitast til útreiðslur oman fyri kr. 600,- um ársfjórðingin.

*Stk. 2.* Egingjald hjá børnum verður at rokna uppí egingjaldið hjá tí, sum hevur foreldrarættin, soleiðis at hetta tilsamans er kr. 600,- um ársfjórðingin.

*Kærumyndugleiki*

**§ 5.** Avgerðir tiknar eftir hesi kunngerð kunnu kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at umsøkjarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

*Gildiskoma*

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. juli 2009. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 100 frá 20. desember 1999 um stuðul til heilivág eftir forsorgarlógini og almannapensjónslógini.

Almannamálaráðið, 23. juni 2009

**Rósa Samuelsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/Eyðun Mohr Hansen (sign.)

**Kunngerð**
**um**
**endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku**

Við heimild í § 17, stk. 4 í lov for Færøerne om offentlig forsorg, jfr. lovbekendtgørelse nr. 100 af 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 8. mai 2003 og seinast broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 25. mai 2009, verður ásett:

*Persónsskari*

**§ 1.** Persónur, sum í heiminum uppiheldur einum barni við likamligum ella sálarligum breki ella sjúku, kann fáa endurgjald fyri fullan ella partvísan miss av arbeiðsinntøku.
*Stk. 2.* Við sjúku sbrt. stk. 1 er at skilja varandi sjúka, ið væntast at vara í fleiri ár.
*Stk. 3.* Við brek og sjúku sbrt. stk. 1 er at skilja brek og sjúka, ið hevur við sær munandi avleiðingar fyri barnið í gerandisdegnum.
*Stk. 4.* Við í heiminum at uppihalda barni sbrt. stk. 1 er at skilja, at barnið skal búgva hjá uppihaldaranum og ikki hava uppihald uttanfyri heimið við viðvirkan frá tí almenna.
*Stk. 5.* Persónur sbrt. stk. 1 fevnir eisini um foreldur, ið ikki býr saman við barninum, og um aðrar persónar, ið viðvirka til uppihald av barninum.

*Treytir*

**§ 2**. Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sbrt. § 1 verður veitt, tá frávera frá arbeiði í styttri ella longri tíðarskeið er ein neyðug avleiðing av at uppihalda einum barni við likamligum ella sálarligum breki ella varandi sjúku heima.
*Stk. 2.* Endurgjaldið sbrt. stk. 1 er treytað av, at ein avleiðing av sjúkuni ella brekinum er, at tað er neyðugt og besta loysnin, at tað er uppihaldarin, sum er um og ansar barninum heima orsakað av:

1) likamligum veikleika ella mongu sjúkuherðindum hjá barninum, ið hava við sær stóran tørv á støðugari røkt og umsjón,
2) at barnið ikki dugir at kenna avleiðingarnar av egnum gerðum, ið hevur við sær, at vandi kann vera fyri, at barnið sjálvt ella onnur koma til skaða, og stórur tørvur tí er á støðugari umsjón og hjáveru,
3) at barnið svevur sera illa og lítið, og tørvur tí er á títtum tilsýni og hjálp alla náttina,
4) at barnið skal til nógvar kanningar og viðgerðir, og tørvur tí ofta er á at kunna fylgja barninum til sjúkrahús ella annað viðgerðarstað,
5) at sjúkan hjá barninum er skiftandi við atliti at styrki, pínu og herðindum, og tað tí støðugt má metast um, hvørt barnið kann vera í skúla, dagtilboði ella stuðulsfyriskipan,
6) at niðursett immunverja ella stórur sjúkuvandi hava við sær, at barnið ikki kann vera í skúla, dagtilboði ella í aðrari ansing uttanfyri heimið, ella
7) øðrum líknandi umstøðum.

*Stk. 3.* Um nøktandi tilboð eftir lóg um dagstovnar og dagrøkt ella stuðul eftir § 32 c í forsorgarlógini kann ávísast barninum, er treytin sambært stk. 1 ikki lokin.
*Stk. 4.* Frágreiðing frá viðkomandi serlækna skal fyriliggja í mun til meting eftir stk. 1-3.

**§ 3**. Endurgjald fyri mista inntøku sbrt. § 1 verður játtað fyri í mesta lagi eitt ár í senn.
*Stk. 2.* Um broyting hendir í einum játtanarskeiði, ið hevur við sær, at treytirnar fyri at fáa endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku ikki longur eru loknar, kann endurgjaldið halda fram í upp til 3 mánaðir frá endanum av tí mánaði, at broytingin hendi.

*Endurgjald*

**§ 4.** Endurgjald sbrt. § 1 verður veitt við støði í inntøkugrundarlagnum sbrt. § 5. Inntøkugrundarlagið kann tó í mesta lagi vera kr. 25.000 um mánaðin, íroknað frítíðarløn og møguliga arbeiðsinntøku, sum viðkomandi framhaldandi hevur.
*Stk. 2.* Endurgjaldið er ein nettoveiting, ið verður ásett sum inntøkugrundarlagið sbrt. § 5 frároknað landsskatt, kommunuskatt og arbeiðsmarknaðargjøld.
*Stk. 3.* Í skattaútrokningini sbrt. stk. 2 verður sæð burtur frá serligum frádráttum og skattafyrimunum hjá ávísum løntakarabólkum.
*Stk. 4.* Tað verður ikki veitt endurgjald fyri møguligum arbeiðsgevaraparti av eftirlønargjaldi.
*Stk. 5.* Útreiðslur, sum viðkomandi sparir í sambandi við, at viðkomandi ikki longur arbeiðir, verða frároknaðar í endurgjaldinum sbrt. stk. 1.
*Stk. 6.* Endurgjaldið verður frároknað frítíðarløn, sum verður útgoldin 1. mai. Frítíðarlønin er munurin millum endurgjald sbrt. stk. 2 og endurgjald sbrt. stk. 2 býtt við 1,12.
*Stk. 7.* Endurgjaldið verður útgoldið mánaðarliga.
*Stk. 8.* Innvunnin frítíðarløn verður mótroknað í endurgjaldinum í mai og juni mánaða.
*Stk. 9.* Fær móttakarin aðra inntøku enn hana, sum liggur til grund fyri ásetingini verður hendan mótroknað. Verður henda arbeiðsinntøkan støðug, skal endurgjaldið takast upp av nýggjum.

*Inntøkugrundarlag*

**§ 5.** Inntøkugrundarlagið er væntaða mista arbeiðsinntøkan íroknað frítíðarløn sbrt. váttan frá arbeiðsgevara um setanarviðurskiftini.
*Stk. 2.* Grundarlagið, sum endurgjaldið verður roknað eftir, er móttikna miðal mánaðarliga A-inn-

tøkan seinastu 12 mánaðirnar fyri fráveruna.

*Stk. 3.* Í teimum førum har teir seinastu 12 mánaðirnir ikki eru eitt umboðandi tíðarskeið, kann eitt styttri og betri umboðandi tíðarskeið nýtast.

*Stk. 4.* Í teimum førum har móttakarin enn ikki er komin á arbeiðsmarknaðin, verður inntøkugrundarlagið ásett við grundarlag í tí inntøku, sum viðkomandi undir vanligum umstøðum hevði havt.

*Stk. 5.* Í teimum førum, har arbeiðsinntøkan heilt ella partvíst verður útgoldin sum ein skattafrí løn, verður hon umroknað til bruttoløn og nýtt sum inntøkugrundarlag, og síðani verður endurgjaldið útroknað sambært § 4, stk. 2.

*Stk. 6.* Fyri sjálvstøðug vinnurekandi, sum ikki hava A-inntøku, verður inntøkan seinasta álíknaða inntøkuárið nýtt sum grundarlag. Er henda inntøka ikki eitt umboðandi inntøkugrundarlag, verður skrásetta metta B-inntøkan í verandi ári nýtt sum grundarlag. Í teimum førum, tá inntøka sbrt. 1. og 2. punktum ikki er umboðandi inntøkugrundarlag, kann støði verða tikið í tøku inntøkuni higartil sambært seinasta roknskapi ella í møguligari útreiðslu til avloysara.

*Umsiting*

**§ 6.** Almannastovan tekur avgerð um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku út frá eini heildarmeting av støðuni hjá barninum og familjuni. Í málsviðgerðini tekur Almannastovan atlit til:

1) at forðast skal fyri, at brekið ella varandi sjúkan hjá barninum versnar ella fær aðrar og meiri álvarsligar fylgjur, og
2) at familjan fær eina so vanliga tilveru sum møguligt, hóast likamliga og sálarliga brekið ella varandi sjúkuna hjá barninum.

*Kærumyndugleiki*

**§ 7.** Avgerðir sambært hesi kunngerð kunnu kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at umsøkjarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

*Gildiskoma*

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. juli 2009.

Almannamálaráðið, tann 24. juni 2009

**Rósa Samuelsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/Eyðun Mohr Hansen (sign.)

Nr. 95 25. juni 2009

**Kunngerð**
**um**
**árligt gjald fyri umsitingina av alilógini**

Við heimild í § 10 a í løgtingslóg nr. 70 frá 9. juni 1988 um aling av fiski v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 127 frá 22. desember 2008, verður ásett:

**§ 1**. Fyri hvørt aliloyvi til at ala fisk skal loyvishavarin rinda eitt árligt gjald upp á kr. 8000 fyri umsitingina av alilógini.

*Stk. 2*. Undantikin gjaldinum eftir stk. 1 eru lívfiskaaliloyvi og granskingar- og royndaraliloyvi.

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 25. juni 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Maria Róin (sign.)

FØROYAPRENT